# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2013

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 5<br>Tíð: 30. mai 2013 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Pól Thorsteinsson</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir býráðslimir</td><td>Ikki á Fundi:</td></tr>
</table>

**1) Mál nr.: 13/00043 og 13/00058** Grannskoðan, tilboð frá Januar og Numo.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál viðvíkjandi einum møguligum skifti av grannskoðara. Valið stendur millum 2 tilboð. Eitt frá núverandi grannskoðara Januar (fyrr Nota / Rasmussen & Weihe), og hitt frá Numo. Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til, at velja Numo, og harvið skifta grannskoðara.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við tilmælinum frá Fíggjarnevndini, og harvið verður Numo nýggjur grannskoðari.

**2) Mál nr.: 13/00117** Umsókn um stuðul

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um stuðul á kr. 60.000 frá sluppini Johanna TG 326. Bæði Mentanar- og Fíggjarnevndin mæla til, at stuðulin verður játtaður.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við tilmælunum frá nevndunum.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00145** Byggiroknskapur fyri Hamragarð pr 31.12.2012

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram rættaðan byggiroknskap fyri ellisheimið Hamragarð. Byggikostnaðurin á tkr. 54.696 er óbroyttur. Landið hevði ikki útgoldið tkr. 1.079, men tað er útgoldið nú. Millumverandi við Landsverk, ið var uppgjørt av teimum, er síðani hækkað. Fíggjarnevndin mælir til, at Býráðið samtykkir rættaða byggiroknskapin.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at góðkenna byggiroknskapin.

**4) Mál nr.: 13/00146** Ársroknskapur fyri Vágs Kommunu 2012

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram ársroknskapin fyri 2012. Rakstrarútreiðslurnar vóru tkr. 30.689, íløgurnar vóru tkr. 8.626 og inntøkurnar vóru tkr. 39.143. Hetta gevur eitt RLÚ á tkr. -172. Fíggjarstøðan javnvigar við tkr. 10.500. Fíggjarnevndin mælir til, at góðkenna roknskapin.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at góðkenna ársroknskapin.

**5) Mál nr.: 13/00147** Grannskoðanarprotokoll fyri Vágs Kommunu 2012

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram grannskoðanarprotokollina fyri 2012. Umsitingin skal arbeiða víðari við nøkrum tilmælum frá grannskoðarunum, og royna at fáa øll tilmælini loyst skjótast gjørligt. Fíggjarnevndin mælir til, at góðkenna protokollina.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at góðkenna protokollina.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 13/00150** Umfígging av lániskuld

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn, ið er send til Fíggjarmálaráðið. Søkt varð um, at kommunan upptekur eitt nýtt lán. Nýggja lánið hevur munandi lægri rentu enn núverandi 3 lán, ið nýggja lánið skal avloysa. Hetta nýggja lánið skal koma ístaðin fyri núverandi lán hjá kommununi og báðum sjálvsognarstovunum (Vágs Ítróttarráð og Eldrasambýlinum). Verður umsóknin gingin á møti verða báðir sjálvsognarstovnarnir avtiknir, og lagdir inn í kommunala roknskapin. Fíggjarnevndin mælir til, at taka undir við umsókníni.

Eydis Kjærbo var ikki við í viðgerðini, tí hon metti seg ógegnigan.

**Avgerð:**
Samtykt við 8 atkvøðum fyri, at taka undir við umsókníni.

**KUNNING :**
- Fjarlestrardepilin, gongdin í málinum higartil.
- Kommunal samstørv í Suðuroynni.

Undirskriva: